## DAGSINS MEINING

# Mugu betra um trygdina í Norðuratlanshavi

Á Norðurlandaráðsfundinum í Oslo nú um dagarnar var ein fyri Føroyar sera áhugaverdur og álvarsligur spurningur umrøddur. Tað var Anfinnur Kallsberg, løgmaður, sum tók spurningin upp. Tað snýr seg um einki minni enn um trygdina og umhvørvi í Norðuratlantshavi, ja í veruleikanum um okkara tilverugrundarlag. Ikki bert okkara men eisini tað hjá grannatjóðum okkara í útnorði, Íslandi og Grønlandi.

Løgmaður sær stórar vandar hótta, tá umræður føroyska havumhvørvið í framtíðini. Ein orsøkin er økti flutningurin av kolvetnum úr Barentshavinum til Amerka, tvs. framvið Føroyum, og hin hóttanin kemur frá eini aljtóða samtykt, sum hevur við sær, at allur sjógvur frá Gibraltar til Bretlands fær serstøðu sum vart øki. Løgmaður vísti í samrøðu við Sjónvarp Føroya í farnu viku á, at hetta kann hava við sær, at vandamikla ferðslan verður trýst norðureftir ímóti Føroyum. Løgmaður segði við sjónvarpið, at talan kann vera um skip við vandamiklum farmi, oljuskip, skip við kemikalum, sum kanska ikki lúka tey allarstørstu trygdarkrøvini og harvið kunnu stey verða ein stór hóttan móti umhvørvinum í føroyskum sjógvi.

Anfinnur Kallsberg bar sum sagt hetta uppá mál í Norðurlandaráðnum herfyri. Hann segði við sjonvarpið, at nýggju altjóða reglurnar mugu eisini fevna um okkara øki og fekk løgmaður fulla undirtøku frá hinum norðurlondunum at fremja eitt átak, soleiðis at okkara havøki i Norðuratltanshavi fær somu trygd sum øki aðrastaðni.

Løgmaður sigur, at hendir ein stór vanlukka so eru vit neyvan før fyri at tacla hana optimalt men vit eru betri før fyri tí í dag enn fyri 10 árum síðani. – Sjálvandi verða vit ongantíð fult út tilreiðar at taka okkum av eini vanlukku skuldi hon hent í føroyskum sjógvi og tí er tað so umráðandi, at vit eiisni hava skipað viðurskifti um tað samlaðu trygdina i hesum havumhvørvinum sum vit eru í.

Uppskotið hjá løgmanni er nú latið umhvørivsráðharrunum í Norðurlandahráðnum at arbeiða víðari við. Eitt skilagott og sera viðkomandi uppskot, sum okkara løgmaður her nemur við og sum vónandi eisini fer at fylla nógv í Oljumálaráðnum, nú tað eftir ætlanini í framtíðini fer at leggja seg enn meira eftir at umrøðu umhvørvismál. Ein uppløgd uppgáva hjá – hvør veit – kanska tí »nýggja« umhvørvismálaráðnum at taka sær av.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Himmalfluktin í almennu rakstrarútreiðslunum heldur fram

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



Undirritaði bleiv av Hergeiri Nielsen lagdur undir at birta uppundir enn størri samfelagsligan rakstur, – neyvan kann nakað vera meira skeivt.

At blanda løgu og rakstur saman er kanska í hugaheimi Hergeirs eitt feitt, men ikki hjá mær.

Tað er nevniliga ikki íløgurnar, sum gjørdar eru sum koma at hvølva samfelagsskútina, men tann alsamt økti vøksturin í rakstrarútreiðslum landskassans.

Eisini kappingarføri okkara er versnað ca. 25% seinastu árini m.a. orsakað av nógv øktu lønarútreiðslunum á privata arbeiðsmarknaðinum og spurningurin er um ikki hetta er ein av orsøkunum til stóru útflutningsnøgdirnar av rundum feskum fiski?

Sambært uppgerð frá Hagstovuni eru vøksturin í Almennu fyrisitingini frá 1998 til og við 2002 fylgjandi í krónum:

Almenna nýtslan er vaksin við 790 milliónum frá 1998 til 2002. Almenna nýtslan vil siga nýtslan hjá landið, kommununum, almennum grunnum og ríkisstovnum í Føroyum. Hetta er ein vøkstur á í miðal 9% um árið.

Meginparturin av vøkstrinum eru lønir. Tær vuksu tilsamas við 515 mió. krónum í tíðarskeiðnum, sí talvuna niðanfyri:

| | Vøkstur í lønarútreiðslunum |
|---|---|
| 1998-1999 | 98 mió. |
| 1999-2000 | 122 mió. |
| 2000-2001 | 119 mió. |
| 2001-2002 | 176 mió. |
| *Tilsamans* | *515 mió.* |

Siga vit at 3,5 størv eru uppá milliónina svarar tað til at tað almenna hevur sett 185 nýggj størv um árið frá 1998 til 2002.

Yvirlitið niðast vísir lønarútreiðslurnar í landsfyrisitingini frá 1998-2002:

Ein vøkstur uppá í miðal knapt 129 mió. krónir um árið, ella í miðal 8,7% um árið.

Aðalfyrisitingin hevur sett í meðal 24 nýggj størv um ári frá 1998-2002.

Lønarútgjaldingar innan privata sektorin, fiskivinnu, og servicuvinnuna minka støðugt í løtuni, meðan kruvin fyri almennar lønir bert gongur ein veg nevniliga støðugt uppeftir. Økingin í almennu lønarútreiðslunum í komandi ári verða umleið 100 mió. krónur.

Tað er rímiliga lætt at minka og stýra kostnaðum í samb. við íløgur sum ikki hava rakstarútreiðslur við sær framhaldandi.

Hinvegin er tað, at man letur rakstarútreiðslunar ótálmandi økjast innan almennu umsitingina ein sera stórur trupuleiki, tí tað er nærmast vónleyst at minka henda aftur.

Hvør tosaði um sjálvberandi búskap?

| Heimastýrið | Vøkstur í lønarútr. 1998-2002 | Miðal lønarvøkstur | Veruligi miðal lønarvøkstur | Størv um árið |
|---|---|---|---|---|
| Aðalfyrisiting | 56.746.478 | 14.186.620 | 6.978.648 | 24,4 |
| Rættarmál | 1.160.615 | 290.154 | 256.191 | 0,9 |
| Vinnubúskaparlig mál | 44.006.930 | 11.001.733 | 6.865.536 | 24,0 |
| Umhvørvisvernd | -23.640 | -5.910 | -20.820 | -0,1 |
| Heilsumál | 74.482.614 | 18.620.654 | 3.367.576 | 11,8 |
| Mentamál | 8.944.631 | 2.236.158 | 1.178.743 | 4,1 |
| Undirvísingarmál | 100.376.781 | 25.094.195 | 6.793.925 | 23,8 |
| Almannamál | 65.620.081 | 16.405.020 | 4.413.681 | 15,4 |
| ***Tilsamans*** | ***351.314.490*** | ***87.828.623*** | ***29.802.772*** | ***104,3*** |

*Kelda: Vinnuhúsið*

# Bátafelagið heldur fram við somu nevnd

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavnar Bátafelag*

Tórshavnar Bátafelag hevði ársaðalfund tann 8. okt 2003 í hølum felagsins. Øll nevndin bleiv afturvald.

Á nevndarfundi tann 27. nov. skipaði nevndin seg soleiðis:

Kartni Olsen, *formaður*
Øssur Hjalt, *næstformaður*
Alvi Nielsen, *kassameistari*
Páll Klein, *skrivari*
Erhard Mortensen, *nevndarlimur.*

Eyðkalimir:
Petur Jensen
Jegvan Bæk

Felagið veksur alsamt, og hevur nú meiri enn 600 limir.

Hugnaligu felagshølini niðri í Vágsbotni eru opin mánakvøld og mikukvøld kl. 20.00 til 22.00, og leygardag kl. 10.00 til 12.00. Tá hittast limirnir til ein kaffimunn og hugnaligt prát um alt, sum hevur við bátar og sigling at gera, og mangt, mangt annað.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Øsingarherferðin mikla

**Kai Vágfjall**



Tað sær út sum, at javnaðarflokkurin er rættuliga farin í hernað mótvegis tjóðveldisflokkinum, og serliga formanninum Høgna Hoydal. Vápnini eru ongantíð nóg ljót ella skitin. Hampafólk øtast og undrast, og mong hava tikið til pennin, eins og undirritaði.

Ein kann spyrja, hvat er gali hjá javnaðarflokkinum? Haldi bara eg kann taka undir við øðrum, sum eru komin við boðum uppá hendan spurningin, at tað er »frustratión«, sum fær tey at bera seg so at. Flokkurin stendur bara á síðulinjuni uttan ávirkan og rópar ókvæmisorð. Hesa støðu hevur hann bara sær sjálvum at takka sær fyri, við sínum afturhaldandi og tvøra politikki, ella rættari sagt tørvandi boð uppá politik, og sum handlangari fyri fremmant yvirvald.

Orð sum nasistar, fasistar, krýstallnáttin, Hitler, Stalin, bølmenni í Albania og hvat veit eg, verða brúkt um formann floksins. Tá so Høgni Hoydal, sum enn ikki hevur stevnt nøkrum fyri ærumeiðing, mælir til siðiligheit, og at vanda sær um orðini, gerðast hesi fólk púrasta frá sær sjálvum av øði, og í blindum haturi og illsinnisherðindum halda tey á at kalla, útspilla og dálka hann og flokkin. Ringasta orðavæl, sum ein helt bara var at finna úti á gøtuni, draga tey inn á okkara fyrr so tignaliga løgting.

Nú eina náttina varð hakakrossurin hjá týsku nasistunum málaður uppá ein samkomubygning í Klaksvík. Um tað er ein avleiðing av hesari javnaðarøsing veit eg ikki, men tað er nærliggjandi at hugsa so. Frammferð og øsing javnaðarmanna elir í hvussu so er ikki til tað øvugta, so eg spyrji, hvat verður tað næsta?

Í eini grein í bløðunum í síðstu viku misbrúkar formaður javnaðarfloksins undir heitinum »Tey reinu – tey røttu – tey rættvísu«, sjálvt Orð Guds. Hann samanlíknar Høgna við farisearan í templinum og seg sjálvan við tann neyðars tollaran. Eisini misbrúkar hann myndina um flísina og bjálkan. At tveita hetta eftir Høgna, heldur enn at brúka tað uppá seg sjálvan er skelkandi. Ein og hvør eigur fyrst og fremst at rannsaka seg sjálvan, um viðkomandi sjálvur hevur nakran bjálka ella flís í egnum eyga. Men kanska fari eg skeivur. Jóannes hevur kanska rannsakað seg sjálvan, og bara ongan bjálka ella flís funnið hjá sær sjálvum? Hvør er tá farisearin og hvør er tollarin? Hetta kunnu lesararnir sjálvir meta um. Lat okkum sleppa undan slíkari gudsspottan.

Í somu grein skrivar Jóannes: »Ikki tí, Høgni Hoydal er í orðavali og framburði vanliga sera hampuligur...«. Her er okkurt, sum ikki samsvarar í nevndu grein. Í øllum førum hevur formaður javnaðarfloksins givið »bølmenninum« í tjóðveldisflokkinum besta skotsmál. Er tað hetta sum innast inni pínir javnaðarfólk, at tey ikki liva upp til at brúka eitt hampuligt orðaval og framburð, og so fær tey at gartera so í av reinari øvund?

Annars er greinin sera óndsinnað og full av lygnum, haturi og á allan hátt ósømulig. At hugsa sær, at greinin er skrivað av einum sum bjóðar seg fram sum løgmannsevni. Neyðars føroyingar.

# Eitt sjálvmal í slowmotion – at dekonstruera seg sjálvan

**Kim Simonsen**



Regin Eikhólm skrivar eitt svar til mín um greinar um Erasmus Montanus, ið nærum kundi líkst einum veruligum bókmentakjaki, men til endans enda vit aftur í føroyska kjakflórinum, har eg skal svínast til (sum eg eri vanur við). Sjónarmiðið hjá Eikhólm, var sum so, at eg ikki havi skilt ella virði dualitetin í figurinum Erasmusi, at hesin bæði hevur rætt og í støðum tekur feil. Hetta kom fram, tí eg setti meg at rokna hvat Erasmus Montanus hevur verið brúktur til í føroyskum kjaki, ella meiri hvussu hann hevur verið (mis)brúktur. Í hesi leitan kom eg fram á eitt stað, har Eikhólm samanber varaløgmann við hendan Erasmus, sum so ómetaliga nógv onnur. Hetta er ikki tað minsta originalt og er gjørt tíggju túsund ferðir fyrr. Har eg so seinni í frøðligum greinum í Sosialinum vísti á, at hesin Montanus er ein kompleksur persónur, ið tí mest av øllum altíð hevur verið misskiltur og misbrúktur, av einari svartari og hvítari hugsan. Hetta tikist Eikhólm at vilja góðtaka nú, og vísir seg nú (gjøgnum nærum alla greinina) sum ein gløggur lesari av sjónlekinum Erasmus Montanus, men til endans dugir hann tó ikki at lesa og fasthalda hvat eg (og hann sjálvur) júst segði um Montanus, at hann umboðar bæði tað rætta og hevur síni hábrøgd, tí nú er tað eg sum havi eitt Montanus kompleks, t.v.s. at hann mótsigur síni egnu tulking og mínari, ið hann ikki vil skilja ella dugir at lesa, nú er Montanus ein slíkur, ið man bert kann hava eitt kompleks yvir at líkjast og her er hansara gamla tulking tí undir skinninum.

Vit taka hetta einaferð enn, tí hesin logikkur er so avanserður, at vit noyðast at lesa Eikhólm í slowmotion, sum við øllum sjálvmálum er stuttligt at síggja tey aftur og aftur. Tað løgna við svarinum hjá Eikhólm er sum so, at vit (fyrst) eru so rørandi samdir, nærum gjøgnum alt svarið, har hann so at enda hálar ikki eina hálva syllogismu úr hattinum sum Montanus, men hvat verri er ein fúlan ræstan føroyskan ad hominem (eftir manninum ikki bóltinum) slutning ella konklusión, tí nú er tað eg, ið havi eitt Erasmus Montanus kompleks. Hetta er veruligani logikkur og argumentatión á høgum støði, har allar hvítar kaninir gerast gráir fressar, um hesin maðurin annars tímir at sveiggja sín gandastav, tí nú fastheldur hann eina tulking av Montanusi, sum hvørki eg ella hann sjálvur standa inni fyri. Eg líði altso ikki undir mínari egnu tulking av Montanusi, ið Søren Kierkegaard, Henrik Stangerup og Georg Brandes eisini komu við, men undir henni hjá Eikhólm, sum han sigur seg ikki hava! Hetta má vera tað sum Derrida kallar dekonstruktión, at man finnur fram til mótsetningar í einum argumenti, sum man so uppleysir, fyri at stilla alt upp aftur har alt er vent á 180 stig á høvdið. Glaðar søgur eru í veruleikanum tristar og tristar eru innast inni glaðar. Eikhólm dekonstruerar tí sítt egna argument við ákæruni um eitt Montanuskompleks.

Eg tími ikki at (ill)gita, sum Eikhólm ger um meg, um hvat feilar hesum Eikhólm, ella at psykoanalysera hann fyri kompleks, paranoia ella ótta fyri býarbussum, tað er eins absurd sum tað hann ger við meg, t.v.s. stillar eina diagnosu um at eg havi eitt løgið kompleks, at eg líði undir hansara feiltulking av einum 200 ára gomlum sjónleiki eftir Holberg gamla. Fingu tit hatta við?

Tað er enn langt frá at dekonstruera seg sjálvan til veruliga rekonstruktión, realismu og perspektiv. Tað er torført at liva við komplementariteti, sum tað eisini var hjá Bohr og Einstein. Hvørjaferð teir møttust ella skrivaðu saman vísti Bohr á, hvat næmingurin Heisenberg hevði lært hann, at partiklar í einum atomi vera ávirkaðir av hvussu tú roynir at mála teir. Tað er tí ógjørligt fyri Eikhólm, fyrst at vera Bohr eina løtu og so Einstein til endans og kanska Bohr restina av tíðini.

Eg dámi annars væl nógv at tí Eikhólm hevur skriva og havi ikki klipt heilt fáar greinar út eftir hann, serligani um mál, ið mangan umboða fleiri góð sjónarmið enn føroyskir málfrøðingar, teir slóknaðu vitar, annars hava tvætla um í eini 80 ár.

# Eg meini tað Leivur

**Heðin Mortensen**
*formaður í mentanarnevndini*



Skilji væl, at Leivur Hansen hevur stórar trupulleikar í politikki. Tað má vera møtumikið at standa uttan fyri alla ávirkan, tá ið talan er um at taka avgerðir.

Leivur hevði møguleikan at gera seg galdandi í samband við skúla- og hallarbyggingina í Kollafirði, men hann gjørdi onki, lat bara standa til. Nú má so samgongan taka upp eftir honum og føra út í lívið brotin lyftir frá Leivi; men hetta megna vit eisini, sum víst hevur verið á.

Tað kann ikki burturforklárast, at Leivur í fíggjarnevndini gjørdi eina tilráðing, sum gekk ynskinum hjá kollfirðingum beint ímóti, og atkvøddi hann eisini ímóti hesi ætlan á opnum býráðsfundi. At Leivur fekk kaldar føtur, tá ið allir kollfirðingarnir sótu í býráðssalinum og fylgdu við orðaskiftinum, er ein onnur søga, sum eg ikki skal koma inn á her.

Leivur sigur í greinini hjá sær, at sjálvandi hevði besta og ruddiligasta loysnin verið, at samanlagda kommunan tók við, har sum Kollafjarðar Kommuna slepti, tá samanleggingin fór fram á nýggjárinum 2001.

Eftir hesum úttalisi uppá skrift, so tekur Leivur ikki udir við núverandi ætlan hjá Hallarstuðulsnevndini, so er tað skorið út í papp.

Nei Leivur, ætlanin hjá tær hevði í fyrsta lagi kostað Tórshavnar Kommunu eina íløguætlan, sum kom uppá 40 mió kr. Ongin íløguætlan hevði klárað hetta, og kommunurnar hava jú eitt íløguloft. Nær heldur Leivur, at hetta ynskiprojekt hevði kunnað verið gjøgnumført? Í øðrum lagi leyk sjálv ætlanin ikki á nakran hátt ásetingunum í nýggju fólkaskúlalógini, og vit høvdu framvegis eina fimleika- og venjingarhøll og ein skúla undir jørð.

Sera áhugavert er at síggja øll referatini, sum vísir kostnaðin og gongdina í málinum um skúla-, fimleika- og venjingarhallarbyggingina. Her er Leivur eisini við sum kunningarmaður á økinum. Hetta er ætlanin, sum Leivur saman við kollafjarðarnevndini vil hava. Sig so ikki, at her er fíggjarstýring og visiónir, tá talan er um skúla- og venjingarhallarbygging.

Á forfundi til býráðsfund á vári 2001 segði Leivur Hansen hesi orð »Henda byggiætlan er nakað, sum ein nevnd samansett av fólki í Kollafirði hevur arbeitt við, og hetta má metast at vera eitt ørvidisprojekt, ynskidreymar, sum koma at kosta 40 mió kr. Býráðið kundi kanska moralskt tikið undir við hesum uppskoti um so varð, at bæði skúli og høll kostaði 20 mió kr«.

Sostatt vildi Leivur Hansen ikki kennast við sítt egna barn.

Tvær ferðir hevur Leivur nú mótmælt byggiætlanini í Kollafirði. Nú fáa vit at síggja, hvussu verður triðju ferð?

Haldi, at Leivur skal greiða kollfirðingum frá, hví onki orð stóð í samanleggingaravtaluni um skúla og ítróttarhøll? Hvat tú sigur, heldur ikki í politikki. Talan var jú um at leggja tvær stórar kommunur saman, og tá eiga skrivligu avtalurnar at verða greiðar, ella hvat? Her hevur Leivur eitt forkláringsproblem.

Kollfirðingar skulu ikki hava nakra lappaloysn frá tær. So gott er, at tú onga ávirkan hevur á avgerðir, sum verða tiknar í dag. Teir skulu hava ein framtíðarskúla frá 1. til 9. flokk og eina Ítróttar- og Samkomuhøll, sum lúkar øll samfelagskrøv í dag.

Vit ganga ynskinum hjá kollfirðingum á møti, og nú hendir nakað á økinum.

Heðin bakkar ikki frá givnum lyftum, sum Leivur Hansen.